Mentan og vinna hond í hond!

ÁLIT/BAKGRUND
Jan Müller

Møguliga er tað tilvildin ella er tað lagnan, sum vildi tað so. At tað dag um dag verða løgd fram á Føroya løgtingi tvey álit ella frágreiðingar, sum hvør í sær og saman hava stóran týdning fyri framtíðina hjá hesum landi og fólki. Tað sipað verður til her er mentanarálitið, sum Óla Holm, landsstýrismaður legði fram týsdagin, og síðani oljuvinnuálitið, sum Eyðun Elttør, landsstýrismaður legði fyri tingið dagin eftir, mikudagin. Neyvan hava tvey øki fingið so nógva umrøðu í seinastuni sum nettupp mentanin og oljan. Hvussu er støðan á hesum økjum í dag, hvønn veg ber tað, og hvat vilja vit! Hetta eru dagsins spurningar. Tað er tí kanska ikki so burturvið heldur, at vit fáa tvey aðalorðaskifti á tingi dag um dag um tvey so stór og fyri Føroyar nær tengd mál.

Vinna og mentan hava vanliga ikki verið tengd saman í føroyskum høpi, men hyggja vit uttan um okkum, so er tað heilt vanligt, at hesi bæði økini stuðla uppundir hvørt annað. Symbolikkinum bagir tí heldur einki, tá hugt verður at permunum á teimum báðum álitunum, sum nú liggja á borðunum hjá øllum landsins tingmonnum og landsstýrismonnum sum tvey týðandi skjøl, ið skulu vera við at byggja brúgv millum nútíð og framtíð.

Permurnar á álitunum illustrera væl munin millum hesi bæði økini men sæð í einum størri samfelagshøpi ber eisini til at síggja samanhang og samlag. Á permuni á mentanarálitinum eru tey bleytu virðini, ein bláklokka, meðan tað bókstaviliga sæð eru tey hørðu virðini, sum síggjast aftur á permuni á oljuálitinum, ein diamantherd borikrúna. Harðari kann tað neyvan verða.

Bláklokkan í mentanarálitinum roynir at festa røtur í eini lítlari rivu á eini hellu. Hon livir bara av tí vatni, sum skolar eftir helluni. Her liggur nógvur symbolikkur vísandi til komandi mentanartilgongdina.

Borihøvdið í hinum álitinum, oljuálitinum er so tað harðasta av tí harða, sum er í samfelagnum og sum symboliserar royndirnar at finna fram til oljuríkidømið í undirgrund okkara.

Eftir stendur so spurningurin: hvussu tvey so ymisk øki, tvey so ymisk álit – ið byggja uppá so stórar mótsetningar sum tey bleytu og tey hørðu virðini - kunnu sampakka, virka saman í eini eind landi og fólki til frama.

Tað er eisini búskapur í mentan. Mentanin er í nógvum londum størsti ídnaðurin í framleiðslu av musikki, filmi, radio- og sjónvarpsprogrammum o.ø. Nógv lond hava góðar royndir av, at mentan og vinnulív samstarva, og vinnulívið hevur stóra gleði av at brúka listafólk í vinnulívinum. Tað snýr seg ikki um at keypa ella sponsorera eina konsert ella framsýning. Tað snýr seg um at brúka listafólk inni á virkinum. Tey koma við nýggjum hugskotum, við kreativiteti og fornýggilsi. Tey virki, sum brúka listafólk, fáa gott úrslit.

Taka vit so hina støðuna, so er tað eisini vanligt í okkara grannalondum, at mentanarlívið verður figgjað av vinnulívinum. Stórar fyritøkur hava stovnað grunnar, sum stuðla mentan og list.

Men her er avgerandi, at listin hevur sítt frælsi og kann virka frítt.

Spurningurin er í hvønn mun pengar frá oljuvinnuni skulu í grunnar, og har føroyingar so sjálvir gera av, hvat teir skulu fara til. Ella um oljufeløgini sjálvi skulu gera av, hvussu hesir pengar verða skilabest brúktir til at menna føroyska førleikan í hesi vinnuni.

Tað eru m.a. hesar spurningar vit hava sett teimum báðum landsstýrismonnunum í blaðnum í dag.

Oljuinntøkur skulu gagna mentanini

Finna vit olju, og hon fer at geva samfelagnum nýggjar inntøkur, so er greitt, at hesar koma eisini mentanini til góða. Hetta eru landsstýrismenninir á økinum samdir um, men teir halda eisini, at í verandi støðu er tað landskassin, sum eigur at stimbra og stuðla mentanini

OLJA OG MENTAN
Jan Müller

Nú fyrst eitt mentanarálit er lagt fyri tingið og síðani eitt oljuálit eisini hava vit hitt báðar landsstýrismenninar á økinum og spurt, hvussu teir halda, at hesi bæði økini kunnu samstarva og sampakka í framtíðini.

Óli Holm, landsstýrismaður heldur, at olja og mentan eru knýtt at hvørjum øðrum uppá nógvar ymiskar mátar. Hóast hetta ikki beinleiðis kemur fram í mentanarálitinum, so hava Mentamálastýrið og Oljumálastýrið tosað saman um, hvussu verkætlanir, sum hava tilknýti til eina komandi oljuvinnu best sampakka við eitt nú undirvísing, gransking og mentan her á landi. Herfyri varð avtala gjørd millum tey bæði stýrini um, at verkætlanir, sum Oljumálastýrið umsitur ella veit um, og sum snúgva seg um útbúgving, gransking og mentan, skulu koma til ummælis í Mentamálastýrinum. Eisini hevur verið tosað um at fáa nakað av førleikapengunum yvir í t.d. Mentanargrunnin og Granskingargrunnin. Bæði stýrini eru samd um, at mann lívgar bæði gransking og mentan við møguligum førleikapengum. Men einki ítøkiligt hevur enn spurst burtur úr hesum enn.

Óli Holm sigur, at so hvørt menningin á oljuøkinum tekur dik á seg, er eisini rætt at kanna, hvørji árin henda vinna hevur á mentanina í landinum. Her er tað náttúrligt við einum tøttum samstarvi millum Oljumálastýrið og Mentamálastýrið. Landsstýrismaðurin heldur tað vera náttúrligt, at menninginn á tí mentanarliga og tí vinnuliga økinum og her serstakliga í sambandi við eina komandi oljuvinnu, fylgist at, tí hesi øki uppá so nógvar mátar eru knýtt at hvørjum øðrum.

Óli Holm heldur annars, at høvuðssjónarmiðið má vera, at vit sjálvi gjalda fyri okkara mentan. Men tað forðar ikki fyri, at mann frá oljuvinnuni letur pengar til mentanarætlanir, tí tað verður helst so, at henda nýggja vinnan kemur at hava árin á mentanina.

Landsstýrismaðurin vónar, at vit í næstu viku fara at fáa tvey góð og uppbyggjandi orðaskifti á tingi um ávikavist framtíðar mentanarpolitikkin og oljupolitikkin.

Olja og mentan á tinghúsvøllinum. Teir báðir landsstýrismenninir, Eyðun Elttør og Óli Holm lata hvørjum øðrum síni álit á lesa undan aðalorðaskiftunum á tingi í næstu viku
Mynd Jens K. Vang

Oljuálit fyri tingið

Í gjár legði landsstýrismaðurin í oljumálum drúgva frágreiðing fyri tingið um gongdina og støðuna í oljumálinum. Henda frágreiðing skal vera grundarlag undir einum aðalorðaskifti á tingi í næstu viku um framtíðar oljutilgongdina. Niðurstøðan í frágreiðingini, um mann kann siga tað so, er tann, at vit mugu bíða til at taka nýggjar avgerðir í hesi vinnu, til eitt meira ítøkiligt úrslit fyriliggur um brunnin hjá The Faroes Partnership. Tað verður væntandi meira greitt í summar eftir boring hinumegin markið. Av tí at úrslitini av leitingini á Atlantsmótinum hava ikki verið nøktandi og sum vónir vórðu settar til fer tað helst eisini at hava ávirkan á virksemi her hjá okkum, og tí verður í oljuálitinum mælt til at bíða við at seta eitt kolvetnisráð á stovn til meira fæst at vita um Hessbrunnin.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður heldur tað vera skilagott við tveimum orðaskiftum á tingi í næstu viku um ávikavist olju og mentan. Hóast her er talan um tvey ymisk øki, so heldur hann tað er áhugavert at merkja sær, at hesar báðar umrøður koma um somu tíð, tí olja og mentan hava nakað við hvørt annað at gera. Her hugsar landsstýrismaðurin ikki minst um tað vanligu fólkamentanina, sum eisini sprettur úr teimum vinnumøguleikum, sum eru her á landi, og har ein oljuvinna kemur sum ein nýggjur møguleiki. – Tað skal ikki vera nakar ivi um, at tað er mín vón, at teir nýggju møguleikar, sum ein oljuvinna fer at geva samfelagnum, eisini koma mentanini og øllum Føroya fólki til góða. Eyðun Elttør dylur ikki fyri, at nakað av orðaskifti hevur tikið seg upp um pengarnar, sum oljufeløg lata til førleikamenning. Hann heldur tað vera rætt, at hesir pengar í mestan mun fara til at menna tey fólk og tær vinnur, sum skulu virka í hesi nýggju vinnu. Finna vit olju og vit hava ment fólk og virki til at kunna taka við hesi avbjóðing, so vil alt hitt koma av sær sjálvum. Her sipar hann til tær inntøkur, sum samfelagið fer at fáa frá eini slíkari vinnu, og sum tá fara at koma eitt nú mentanina til góða og vísir til, hvussu nógv oljuinntøkur í øðrum londum eru komnar mentanini har til góða.

Landsstýrismaðurin heldur, at vit eiga ikki at síggja eina oljuvinnu og okkara mentan sum tveir mótsetningar – sum tvey øki, ið mótvirka hvørjum øðrum. – Eg síggi tvørturímóti hesi økini sum partar av somu søk, nevniliga hvussu vit við at fáa samfelagnum nýggjar inntøkur frá okkara egna tilfeingi, kunnu vera við til at skapa trivna og menning á øllum økjum, og her ikki minst á tí mentanarliga økinum. Lat okkum tí m.a. við álitinum um oljuna í aðrari hondini seta út í kortið ein miðvísan og skilagóðan politikk, sum so aftur kann vera karmur nettupp at kunna føra út í lívið teir góðu tankar og intentiónir, sum vit finna í mentanarálitinum. Eyðun Elttør heldur, at soleingi vit ikki fáa stórar inntøkur frá oljuvinnuni, so eigur landskassin at verða við til at stuðla og stimbra mentanini.

Hann sær annars fyri sær, at mentan og vinnulív eru at meta sum tvey tannhjól, sum kunnu koyra væl saman. Fyri at kunna virka er neyðugt, at hesi samvirka. Og tað er hetta hann og eisini starvsfelagi hansara í mentamálastýrinum peika á saman, nú teir skulu í tingið at við sínum álitum.

Stórarbeiði fyri grønlendingar

KJ-Hydraulik á Kambsdali ger saman við øðrum fyritøkum í Eyturoynni stórt umvælingararbeiði um borð á grønlendskum skipi, sum liggur á Fuglafirði

ÍDNAÐUR
Edvard Joensen

Fuglafirði: Ein grønlendskur línubátur liggur á Fuglafirði, har hann verður umbygdur fyri einar tvær-tríggjar milliónir. Tað eru fyritøkur í Eysturoynni, sum gera arbeiðið.

Tað er fyrrverandi Miðvingur, sum í løtuni verður umbygdur í Fuglafirði. Skipið skal riggast til garnafiskiskap, eins og nýggj verksmiðja verður sett í skipið, og sandblást og málað verður eisini.

Reiðaríið Brdr. Lybert úr Manitsoq hevur keypt skipið úr Noreg, og er tað ávegis til Grønlands komið til Føroya til umbygingar.

KJ-Hydraulik á Kambsdali ger sjálvt umbyggingararbeiðið. Ætlanin er, at skipið skal brúkast til kombineraða garna- og línuveiðu undir Eysturgrønlandi.

Eisini annað arbeiði skal KJ-Hydraulik gera. Ymiskt vanligt servicearbeiði og eisini okkurt fyri klassan.

Skipið er í løtuni skrásett undir hentleikaflaggi, og ein av uppgávunum KJ-Hydraulik er millum annað at syrgja fyri øllum í sambandi við umflagging til grønlendskt flagg.

Nýggj verksmiðja verður gjørd umborð, og henni tekur FJM í Runavík sær av, meðan felagið Sandblásing við Ljósá stendur fyri sandblásing og máling.

Alt í alt verður arbeitt fyri eina tvær tríggjar milliónir umborð á hesum skipinum, sigur Ólavur A. Olsen, stjóri hjá KJ-Hydraulik.

Nógv at gera

Hann letur hampiliga væl at gongdini í løtuni. Smiðjurnar hava væl at gera, sigur hann, hóast tað ikki er, sum tá tað var upp á tað mesta.

– Nú tykist, sum tað ringasta trýstið er farið av, sigur hann. Og hann grundar tað partvís á, at nú eru vinnutólini aftur komin í so mikið frægan stand, at ikki er brúk fyri smiðjum alla tíðina.

– Sannleikin var tann, sigur Ólavur Olsen, at skipaflotin var so niðurslitin aftan á kreppuna, at skipini høvdu alla tíðina fyri neyðini at verða kínd og kelað fyri at hanga saman.

Nú eru færri umvælingar. Lutvíst tí tær stóru eru gjørdar, men eisini tí, at nú eru partar av flotanum skiftir út við nýggjari skip, sum ikki hava tær øgiligu umvælingarnar fyri neyðini.

Eisini kann tað spæla inn, heldur hann, at fleiri nýggj skip eru ávegis, og eigararnir hava tí líkasum ikki hug at brúka pening upp á tað gamla, sum kortini veður lagt ella kanska selt.

Men hóast tað tykist vera komið meira í fasta legu við smiðjuarbeiðinum nú, er einki, sum bendir á, at tað fer at gerast ov lítið kortini. Allar smiðjurnar hava tað, tær klára, og folkið kennir seg trygt og hevur ikki grund til at óttast nakað arbeiðsloysi, sigur stjórin á KJ-Hydraulik á Kambsdali.

Nýbygningar

Kj-Hydraulik eigur eisini smiðjuna Hydro-Tech á Eiði. Og har manglar fólk í løtuni. Lýsing hevur verið at sæð í blaðnum, har søkt verður eftir smiðjum og sveisarum til Hydro-Tech.

– Tað kemst nú mest av, at onkur er farin í annað starv, og vit skuldu so brúka fólk, sigur Ólavur Olsen.

Men tað knípur at fáa smiðir, sigur hann. Einir tveir sveisarar hava boðið seg fram, men eingin smiður.

Hydro-Tech hevur smíðað fleiri alibátar úr aluminium. Tvíkiljur. Og tí fara teir at halda fram við, sigur stjórin.

Í komandi viku verður ein latin Fiskaaling, og í juni verður tann næsti eftir ætlan latin Atlantic Seafarms hjá Hera Hjelm.

Tá hann er farin, er eingin sáttmáli eftir, sum støðan er beint nú, sigur Ólavur Olsen, Men fleri fyrispurningar eru, so áhugin er har.

Eitt grønlendskt línuskip, sum føroyingar fyrr hava átt, verður umvælt á Fuglafirði fyri einar tvær-tríggjar milliónir
Mynd: Edvard Joensen

Eysturoyingar fara aftur til gongu

Eysturoyar gongufelag fer aftur í ár á fjøllini
Mynd: Óli Simonsen

Skráin hjá Eysturoyar Gongufelag fyri í ár byrjar nú um vikuskiftið, tá farið verður fyrsta gongutúrin

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Saltangará: Eysturoyar Gongufelag byrjar tiltøkini í ár við einum gongurturi úr Rók út á Nes, har aðalfundur verður hildin aftaná. Hesin túrurin er tann fyrsti av 14 túrum, skipað verður fyri í ár.

Kunningarstovan í Saltangará sigur í tíðindaskrivi, at fyrsti gongutúrurin í ár verður sunnudagin 10. mars. Møtt verður úti í Rók, haðani gingið verður gjøgnum Saltnes og Tofgtir út á Nes, har túrurin endar í gamla prestagaðrinum.

Har verður so aðalfundur felagsins. Kaffi og bollar verða at fáa, verður sagt frá.

Annars fer Eysturoyar gongufelag at skipa fyri fleiri túrum í summar. Tann fyrsti eftir aðalfundin verður í apríl, og endað verður í september, stendur at lesa í faldara, sum Ferðavinnan í Eysturoy hevur givið út.

Túrarnir verða ymiskir bæði í torleika og eisini eftir, hvar teir verða. Einir tveir túrar verða aðrastðani enn í Eysturoy.

Í mai mánaða er ætlanin at fara ein túr á Viðoynna, har gingið verður niðan á Villingadalsfjall og Enniberg.

Í august er tað Streymoyggin, sum fær vitjan av gongugleðum eysturoyingum. Tá standa Postalakirkja og Tindur fyri tørni. Farið verður úr Vestmanna.

Annars eru túrarnir ymiskir. Bæði fjallatúrar og eisini gongutúrar í bygdum øki.

Eysturoyar Gongufelag sigur, at eingin túrur verður gjørdur yvirhøvur, uttan loyvi fyrst er fingið frá teimum, sum eiga økið, har gingið verður.

Tað kostar 150,- krónur árliga at vera limur í felagnum. Og tað gjaldið er fyri eitt heilt húski.

Allir túrar verða lýstir í bløðunum, umframt á tí faldaranum, sum givin er út. Sum vera man kunnu broytingar koma í, og slíkum hevur felagið eisini tikið hædd fyri í faldaranum.

Um fyrsta túrin, sum verður sunnudagin, sigur Kunningarstovan í Saltangará, at fólk kunnu tekna seg á Kunningarstovuni, sum hevur telefon nr. 44 94 49 ella fartelefon 21 14 49.